# Støkk stendur sterkt




*Kristina Toftegaard úr Støkk gjørdist føroyameistari hjá kvinnum í amboðsfimleiki. Fríðhild Norðgerð úr Støkk gjørdist nr. 2*

**FIMLEIKUR Fimleikafelagið Støkk er eitt stórt og sterkt felag, sum í ár hevur havt 650 íðkandi limir úr nærum øllum bygdum í Eysturoynni, umframt úr nøkrum bygdum í Norðurstreymoy og Norðoyggjum. – Eitt so stórt felag krevur góðar venjingarumstøður, og hesar eru í løtuni ikki á hædd við ambitiónirnar hjá felagnum, verður sagt**

Snorri Brend

Hóast venjingarumstøðurnar ikki eru nøktandi, megnaði Støkk í amboðsfimleiki at vinna eitt FM-heiti fyri einstaklingar hjá kvinnum, og tvey fyri lið hjá ávíkavist pinkum og kvinnum. Harumframt eru fleiri heiðursmerki vunnin í kappingunum, sum hava verið í vetur.

– So sigast má, at vit hava nógvar sera dugnaligar fimleikarar og ágrýtnar venjarar í okkara felagi. Hetta dugnasemið vísir seg m.a. í kappingum uttanlands, har tvær kvinnur frá Støkk umboðaðu Føroyar í NM í Finnlandi í apríl mánaði.

– Hóast einki heiðursmerki kom burturúr, vóru kvinnurnar væl nøgdar við úrslitið, verður sagt úr felagnum.

Aftur í ár hevur verið kappast í estetiskum fimleiki, og har kláraði Støkk seg væl. Smágenturnar gjørdust føroyameistarar, pinkur, gentur og kvinnuunglingar vunnu silvur og kvinnurnar fingu bronsu.

Fleiri heiðursmerki vórðu eisini vunnin í estetisku steypakappingunum í vetur, so hetta hevur eisini verið eitt gott ár fyri estetiska fimleikin í Støkk.

## Nýggj Støkkhøll

Hetta, at tað eru so nógvir íðkandi limir, setur stór krøv til venjingarumstøðurnar, tí felagið ynskir at bjóða eitt gott og fjølbroytt tilboð til bæði breiddarfimleik og kappingarfimleik.

Arbeitt hevur leingi verið við eini ætlan um eina nýggja Støkkhøll og hetta arbeiðið heldur fram. Í nýggju høllini verða sera góðar umstøður til amboðsfimleik, estetiskan fimleik og breiddarfimleik.

– Vónandi verður Støkkhøllin veruleiki í nærmastu framtíð, verður sagt.

## Eystanstevnan

Á Eystanstevnu skipar Støkk fyri renning fyri øll áhugað.

Runnið ella gingið verður 2,5 km og 5 km, og byrjað verður við ítróttarhøllina hóskvøldið kl. 19.

Støkk skipar eisini fyri karnevalinum, sum verður fríggjakvøldið. Farið verður frá Glyvra skúla kl. 19, har ítróttarfólk frá Støkk, NSÍ og Kappróðrarfelagnum NSÍ, í besta karnevalstíli, ganga út á stevnuøkið.

*snorri@sosialurin.fo*



*Smágenturnar úr Støkk gjørdust føroyameistarar í estetiskum fimleiki í ár*